**inni** - trygt og ómaksleyst til hús



**Sethús – Børkugøta 9, Tórshavn**

Húsini eru í 2 hæddum. Niðara hæddin er 104 fermetrar og ovara hæddin er 75 fermetrar - í alt 179 fermetrar. Grundøkið er 500 fermetrar. Byggiár: 1985. Í miðhæddini er inngongd, durur hall, køkur / alrúm, borðstova / stova, skrivstova / kamar, baðirúm / wc / vaskirúm, bryggers / fýrrúm og hjallur. Í ovaru hædd er trappugongd, hjúnarrúm / stova, baðirúm og 3 kømur. Húsini, sum eru í sera góðum standi, standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinarligum umhvørvi og hava gott útsýni.
Prísuppskot: kr. 2.500.000,00



**Handilsbygningur til leigu – Dr. Jakobsensgøta 5, Tórshavn**

Húsini eru í 3 hæddum hvør á 58 fermetrar – í alt 174 fermetrar. Húsini eru í góðum standi og eru dagførd so við og við. Í miðhæddini er inngongd, gongd, 2 skrivstovur, tekøkur. Í ovastu hædd er trappugongd, køkur, stova, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hædd inngongd, 2 handilshøli, wc, køkur, kjallari / fýrrúm. Hartil er úthús / goymslurúm. Húsini standa sera væl fyri mitt í býnum við virkna handilsgøtu. Tey kunnu eins væl nýtast til privat sum til vinnuligt endamál og kunnu leigast í einum ella hvørt leigumál sær. Áhuga kunnu venda sær til P/F Inni.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

**inni**




# SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akfaradeildina at byrja skjótast gjørligt. Talan er um eitt fast fulltíðarstarv.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting av akførum
- Avgreiðslu av skrásetingargjøldum
- Eftirstøðumál
- Kassauppgerð

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hans Jacob Stenberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 08. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **4. juni 2007**.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo



# Goymslu- og handilslærlingur á Skipasmiðjuni

Hevur tú hug at koma í goymslu- og handilslæru á Tórshavnar Skipasmiðju?

Vit ynskja, at tú hevur miðnámsútbúgving og at tú:

- Ert opin og hevur lætt við at samskifta
- Hevur góðan teldu- og talførleika
- Ert framfýsin og ágrýtin

Harumframt er tað neyðugt, at tú hevur áhuga fyri mekaniskum og el-lutum.

Í lærutíðini fert tú at starvast á teimum ymisku goymslunum hjá fyritøkuni.

Góður møguleiki er fyri føstum starvi eftir loknað útbúgving.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju P/F
Postboks 65
FO-110 Tórshavn

Att.: Mouritz Mohr

í seinasta lagi 19. juni 2007.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, kanst tú venda tær til Boga Kirke á telefon 30 11 11 ella 50 11 11 ella við telduposti til bogi.kirke@faroeyard.fo.

SKIPASMIÐJAN

Tórshavnar Skipasmiðja
J.C. Svabosgøta 31
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo



# Skipstimburlærlingur á Skipasmiðjuni

Hevur tú hug at koma í læru sum skipstimbrari á Tórshavnar Skipasmiðju?

Á timburdeild okkara er bæði vanligt skipstimburarbeiði og annað arbeiði í sambandi við skip og bátar.

Vit ynskja, at tú:

- Ert nærlagdur og røkin
- Ert áhugaður og ágrýtin
- Hevur lætt við at samskifta

Skúlagongdin í sambandi við útbúgvingina er í Danmark.

Góður møguleiki er fyri føstum starvi á Skipasmiðjuni eftir loknað útbúgving.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju P/F
Postboks 65
FO-110 Tórshavn

Att.: Mouritz Mohr

í seinasta lagi 19. juni 2007.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, kanst tú venda tær til Christoffer Lützen á telefon 50 11 42 ella Mouritz Mohr á telefon 50 11 30 ella við telduposti til mouritz.mohr@faroeyard.fo.

SKIPASMIÐJAN

Tórshavnar Skipasmiðja
J.C. Svabosgøta 31
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo

Sosialurin